

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 08 - 2012

# Føroyski Statoil-stjórin í fokus í týskum blað

Sum ein av teimum stóru fyritøkunum í Europa er stórt fokus á Statoil, sum eisini er sera virkið í Føroyum í løtuni. Í kjararvørrinum á góðu úrslitunum Statoil legði fram í síðstu viku, sum vísti 42 milliardir krónur í yvirskoti eftir skatt fyri hálvárið, hava altjóða fjølmiðlar sett stórt fokus á Statoil. Stór grein var í Financial Times um samtaksstjóran í Statoil Helga Lund í gjár. Í týskum fjølmiðlum er samrøða við føroyingin Rúna M. Hansen um Statoil´sa strategi yvirhøvur og um virksemi í Norra og norðurhøvum. Greinin viðger ávirkanina nýggja skifurgassið og oljan í USA hava á prísin á heimsmarknaðinum og hvussu hetta hevur broytt marknaðin fyri gassinum, sum verður framleitt á Snøhvit feltinum í Barentshavinum. At byrja við var ætlanin at selja gassið frá Snøhvit til USA. Men eftir at USA sjálvt framleiðir nóg mikið av gassi til heimamarknaðin fer gassið frá Snøhvit nú mest til Asia, men annars har prísurin er bestur. Eisini er føroyski Statoilstjórin í greinini í framstandandi týska blaðnum Frankfurter Allgemeine Zeitung inni á, hví Statoil satsar nógv í Arktiska økinum og annars hvussu Statoil arbeiðir á altjóða marknaðinum. Blaðið endurgevur eisini føroyska Statoilstjóran fyri at siga, at felagið eisini sær stórar møguleikar í Norðuratlantshavi, harímillum Føroyum og Grønlandi. Statoil er í løtuni í gongd við 8. leitibrunnin á føroyskum øki, og eftir hvat skilst gongur eftir ætlan.